07 VESTUR — NSÍ

Kappingarárið 2017

1. oktober




Leikskrá nr. 12

07 Vestur
Postboks 51
370 Miðvágur

Formaður:
Jim Sonni Guttesen
jims@jims.fo

Næstformaður:
John Weihe
jwveiting@gmail.com

Kassameistari:
Jón Nordendal
jon@lbf.fo

Nevndarlimur:
Egil Petersen

07 Vestur leikskrá
Útgevari: 07 Vestur

Ábyrgd:
Fróði Poulsen

Myndir og greinar.
Jóanis Albert Nielsen
Ingolf S Olsen
Jarnhold Nattestad
Fróði Poulsen





# Vælkomin á Dungasand

## Steypavinnarnir koma á vitjan

So er aftur landskappingardystur á skránni á Dungasandi, og er hetta kappingarárið komi at halla. Tað eru 9 stig eftir at spæla um, og hesuferð er tað NSÍ ið kemur á vitjan.

Gestirnir vunnu fyrr í ár Løgmanssteypið, og hava harvið tryggja sær pláss í Europa næsta kappingarár. Tað hevur tó ikki gingið serliga væl hjá NSÍ seinastu dystirnar í landskappingini. NSÍ hevur bert fingið 4 útav teimum seinasta 12 møguligustiginum síðani teir blivu steypavinnarar. NSÍ er í løtuni nummar fýra í landskappingini við 40 stigum.

Sama tíðarskeið sum NSÍ bert hevur fingið 4 stig hava vit fingið 6 stig. Seinasta vikuskiftið spældu okkara spælarar ein branddyst móti B36 tá ið vit vunnu 4-3.

Støðan er tann í løtuni í EFFO-deildini at vit eru á 9 plássi við 22 stigum. EB/Streymur er nummar 8 við 26 stigum og Suðringar eru nummar 7 við 28 stigum.



# Vónin livir enn!

**Tað ljóðaði sum søtasta symfoniin, tá Eiler Rasmussen blásti í floytuna fyri seinastu ferð í dystinum móti B36 sunnudagin. Undanfarnu 90 minuttirnir pluss tað leysa varð veruligur kensluligur rutsjubanatúrur, sum sjálvdan hevur sæð sín maka.**

*Jarnhold Nattestad*

Gestirnir javnaðu í 38. minutti, eitt ræðuligt tíðspunkt at fáa mál ímóti, júst fyri hálvleik, og alt hatta har. Men so skoraði Holgar í 43. minutti, og so vendi brádliga alt rætt aftur. Minuttin eftir javnaðu teir hvítu so enn einaferð, hesa ferð beint undan hálvleiki. Men hvat, John Frederiksen var ikki liðugur, og í 45. minutti legði hann okkum aftur á odda. Ótrúligir minuttir.

Annar hálvleikur gav eitt mál í part, og Ivan helt okkum annars inni í dystinum við flottum bjarginum, og so stóðu vit at enda við øllum stigunum.

Dysturin er prógv uppá ótrúliga stríðsviljan, sum býr í okkara monnum. Arbeiðsmoralurin er framúrskarandi og trúgvin uppá egnan mátt er øgilig.

Vónin um yvirliving í EFFO-deildini livir enn. Og vit hava veruliga nakað at byggja uppá, eftir einastandandi úrslitið sunnudagin. Men skal nakað spyrjast burturúr, kunnu okkara menn ikki lata støði lækka, tvørturímóti. NSÍ hava ofta víst stórt yvirskot og hegni móti okkum, ikki minst seinast, tá vit taptu heili 7-0 við Løkin. Vespurnar hava tó havt tað trupult seinastu tíðina, við bert 4 stigum av teimum seinastu 15.

Alt er uppá spæl fyri okkum, umframt at vit hava nógv at hevna. Latið okkum standa saman og geva alt, so vit kunnu hyggja hvønn annan í eyguni eftir dystin.

Koyrið á 07 Vestur!



effo
deildin
2017

Effo ynskir øllum ein góðan dyst

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN

**Sand- og skervsølan í Sandavági**

**Alt innan tilfar - veitan og levering**

**Lastvognskoyring v/Erhard Dam ✆ 213577**



Find us on Facebook

**Lastvognskoyring v/ Erhard Dam**

# Vága Fysioterapi

v/ Klæmint Isaksen Dip.MDT
Hjørleif Niclasen Cert.MDT,MFE

Fyribyrging, diagnosterisering

Hornavegur 12
370 Miðvágur
Tlf. 332 007

fysioterapi@fysioterapi.fo


BANKNORDIK
Tað er heildin, sum telur
Bílegg fund á
www.banknordik.fo/nordik360
Ráðgeving, sum øll skilja


www.wt.fo


Vit hava latið upp nýggjan handil í Tórsgøtu 16 í Havn. Kom og vitja!
MYNDLIST
Rammu- og listavøruhandil · Tórsgøta 16 · FO-100 Tórshavn
tel. +298 25 95 05 · www.facebook.fo/myndlist.fo · myndlist@myndlist.fo

# Pre-Order

**Keyp on-line og slepp undan bíðirøð!**

1. Bilegg og gjald á heimasíðuni
2. Heinta vøruna í handlinum
3. Flúgv út í heim

1. Bilegg og gjald á heimasíðuni
2. Flúgv heim til Føroya
3. Heinta vøruna í handlinum

# Klárt til avheintan - einki roks

Tú kanst nú fáa bílagt og goldið tínar tollfríu vørur longu áðrenn tú kemur í Vága Floghavn.

Vel tínar vørur millum okkara mongu góðu tilboð í **dutyfree.fo**, koyr vørurnar í innkeypskurvina og avgreið ordran við tínum gjaldskorti.

Tá ið tú kemur í Vága Floghavn, hava vit pakka tær vøruna og kanst tú fara beinleiðis víðari á tínari ferð.

Einfalt, skjótt og einki roks.

Les meira og bílegg tínar vørur á **www.dutyfree.fo**.



DUTY FREE FAE

P/F Duty Free FAE    Vága Floghavn    380 Sørvágur    Faroe Islands    Tel. 35 44 00


Banki - Trygging - Pensjón - Heim
Alt á sama stað
betri
Betri pensjón, Eik banki, Tryggingarfelagið Føroyar og Inni skifta navn til Betri. Vit hava savnað allar okkara tænastur, soleiðis at tað gerst bæði lættari og betri hjá tær at vera kundi hjá okkum - alt á einum og sama stað.
betri

# Heildarloysnir frá Articon










ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo



Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo

mykines.fo
must see from sea





IDEmøblar

HÚSFRÍÐKAN

EINGJARTOFTIR 9 • SANDAVÀGUR • TEL 33 33 20





strandamáling

BUSSKOYRING



- Til og frá Flogvøllinum
- Útferðir kring alt landið
- Uttanlandsferðir

Tlf. 21 98 99


Grevstur og Planering V/Eggaba Andreasen
Fartlf. 228 382 - Fartlf. 265 340
Grevstur&Planering


Alt stoypiarbeiði
verður gjørt
Erik Heinesen, Bøur
Tel: 593602


Klima
Torkilsvegur 15
360 Sandavágur
+298 333 555
klima@klima.fo
Klima
hevur loysnina til tín, eisini ta grønu

J.H. Schrøters gøta 7
Postsmoga 258
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 660500
t-postur sokn@sokn.fo

SÓKN
ADVOKATAR



.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa Vágaportalin

.fo
Vágaportalurin

Vága Fysioterapi

v/ Klæmint Isaksen Dip.MDT
Hjørleif Niclasen Cert.MDT,MFE

Fyribyrging, diagnosterisering

Hornavegur 12
370 Miðvágur
Tlf. 332 007

fysioterapi@fysioterapi.fo



07 Vestur, gentur 12



**07 Vestur, gentur 12**

# Ungur veteranur

**Holgar Durhuus úr Vestmanna er bara 24 ára gamal, men hevur spælt næstan 200 dystir á fyrsta liðnum hjá 07 Vestur og skotið 61 mál.**

*Ingolf S. Olsen*
Holgar Durhuus úr Vestmanna var bara 15 ár, tá hann kappingarárið 2008 byrjaði at spæla við tá spildurnýggja 07 Vestur.
Fyrsta árið spældi hann unglingafótbólt, men longu árið eftir, tá 07 Vestur var flutt upp í bestu deildina, spældi hann á fyrsta liðnum hjá felagnum.
Og har hevur hann, undantikið ein avstingara inn á Skálar kappingarárið 2014, spælt síðani.

## Góður við 07 Vestur

Hann er sostatt hóast bert 24 ára gamal – 29. oktober fyllir hann 25 – ein av veteranunum í 07 Vestur. Áðrenn dagsins dyst hevur Holgar spælt 198 dystir á fyrsta liðnum hjá felagnum, og hann hevur skorað 61 mál.
Hann dylir heldur ikki, at hann trívist og hevur trivist væl í 07 Vestur. So væl, at hann hevur sagt nei takk til uttanlands tilboð fyri ikki at svíkja 07 Vestur.
- Eg fekk eitt tilboð um at spæla í Íslandi í januar, men tók eg av tá, so hevði eg sett 07 Vestur í eina keðiliga støðu, tí tað var so seint upp undir byrjanina av kappingarárinum, at teir høvdu ikki havt tíð at funnið ein annan fyri meg. Eg var aftur spurdur í summar, men hevði heldur ikki hug at fara tá, sigur Holgar.
Tað merkir tó ikki, at hann als ikki hevur hug at royna seg aðrastaðni.
- Sjálvandi havi eg tað, og eg eri eisini hampuliga ungur enn, so enn kann nógv henda, sigur Holgar.

## 07 trolaði í Vestmanna

Hondbóltur er høvuðsítróttin í Vestmanna, og Holgar hevur eisini verið í fremstu røð í hondbólti, har hann hevur spælt á besta mansliðnum hjá VÍF.
Men sum smádrongur og hálvvaksin spældu vestmannadreingirnir eisini fótbólt á plenuni við ferjuleguna.
- Tað gjørdi eg eisini, men spældi annars bara hondbólt tá. Nakrir aðrir dreingir á mínum aldri spældu tó fótbólt í Havn, men tá 07 Vestur so var stovnað, vóru tey úti um seg í nærøkinum, og vit blivu spurdir, um vit ikki høvdu hug at koma vestur at spæla.
- Vit mundu vera eini 30 dreingir, sum søgdu ja, og vit blivu koyrdir í bussi til venjingarnar í Sørvági, minnist Holgar.
Av teimum er tað tó bert hann, sum framvegis spælir við 07 Vestur. Seinni kom Torstein Mýlingstind úr Kvívík afturat, og hann hevur eisini hingið í.

## Eitt rend inn á Skála

Tá 07 Vestur flutti niður í 1. deild í 2013, tók Holgar av einum tilboði frá Skála, sum júst var flutt upp í Effo-deildina, um at koma har at spæla. Har spældi hann kappingarárið 2014, men kom so vestur aftur at spæla.
- Mær dámdi væl á Skála, tað var ikki tað, men tað bleiv dekan ov langt at koyra, tí eg búði í Vestmanna og arbeiddi í Havn, so tá 07 Vestur fegin vildi hava meg aftur, tók eg av, sigur Holgar.
Hann hevur arbeitt nógv sum timburmaður, tó at hann ikki hevur verið í læru,




*- Tríggir dystir eru eftir, og vit fara eftir øllum, sum eftir er. Mentalt haldi eg eisini, at vit eru klárir, sigur Holgar Durhuus undan dagsins dysti.*

og nú starvast hann í frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Mátti velja**
Tey fyrstu nógvu árini spældi Holgar bæði fótbólt og hondbólt á hægsta stigi, men tá hann fór inn á Skálar at spæla, gavst hann við hondbóltinum.
- Tað var tí, at kappingin bleiv flutt, so hondbóltkappingin og fótbóltskappingin umskaraðust ov nógv. Áðrenn bar til at spæla bæði hondbólt og fótbólt, men nú mátti eg velja, og eg valdi fótbóltin, sigur Holgar og leggur afturat:
- Tað havi eg ikki angrað, men tá eg síggi VÍF spæla, brellist eg tó onkuntíð eftir at spæla hondbólt aftur.

**Spennandi endaspurtur**
Dagsins dystur ímóti NSÍ er dystur nummar 199 hjá Holgar fyri besta liðið hjá 07 Vestur. Tað stendur á gomlum nøglum, tí í løtuni eru fýra stig eru upp til niðurflytingarstrikuna. Ein onnur lívlína, um enn hon er veik, er í 1. deild, har B 68 skal upp á í minsta lagi triðja plássið fyri at flyta upp í Effo-deildina. Í løtuni er B 68 á fjórða plássi, men stutt er ímillum nummar tvey, trý og fýra. Megnar B 68 ikki longur upp í deildini, verður tað bert eitt lið í Effo-deildini, sum flytur niður, og tað verður ÍF, sum ikki longur hevur møguleika at lyfta seg upp frá aftasta plássinum í deildini.
Men Holgar Durhuus ætlar ikki at dúva upp á, at aðrir enn 07 Vestur-leikararnir sjálvir skulu tryggja liðnum framhaldandi pláss í Effo-deildini.
- Tríggir dystir eru eftir, og vit fara eftir øllum, sum eftir er. Mentalt haldi eg eisini, at vit eru klárir. Spurningurin er bara, hvussu klárur eg verði fysiskt til dystin ímóti NSÍ, tí eg fekk ein skaða í dystinum ímóti Eb/Streymi í næstseinasta umfari, og tann skaðin ger eitt sindur um seg enn, sigur Holgar.
Hann spældi tí við í fantastiska sigrinum á B 36 seinasta vikuskifti, so tað man ikki fara at bila í dag heldur.

VisitVágar
part of the Faroe Islands




pf. **FOSSÁ**
**og HÝSISÁ**

*Tlf. 332691 - Fartlf. 212526 - Fax 333691*
*FO-360 Sandavágur*

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar



Heri Múller **TIMBURMAÐUR**
Junkaravegur 7
340 Kvívík
Tlf. 560560



# Betong og timburarbeiði

Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 - 223124

# LEIKARALISTI

**07 VESTUR**

| Navn | Pláss | Aldur | Dystir | Min. |
|---|---|---|---|---|
| Høgni Nielsen | V | 20 ár | 24 | 1928 |
| Tór-Ingar Akselsen | M-Á | 36 ár | 24 | 1845 |
| Torstein Mýlingstind | V | 24 ár | 23 | 2037 |
| Holgar Durhuus | M | 24 ár | 23 | 1952 |
| Martin Tausen | M | 27 ár | 22 | 1925 |
| Sølvi Egilsson | M | 22 ár | 19 | 1294 |
| Ken Fagerberg | Á | 28 ár | 18 | 1290 |
| Janus Samuelsen | M | 18 ár | 18 | 1230 |
| Ivan Stojkovic | MV | 40 ár | 17 | 1502 |
| Søren Nielsen | Á | 26 ár | 17 | 1342 |
| Jóannis á Steig | V | 20 ár | 17 | 657 |
| Jákup S. Olsen | M | 22 ár | 16 | 594 |
| Petur G. Dalbø | V | 26 ár | 15 | 935 |
| Asbjørn Heðinsson | V-M | 16 ár | 14 | 486 |
| Gunleif Magnusarson | M | 26 ár | 13 | 1073 |
| Pål Fjelde | V | 23 ár | 10 | 900 |
| Dann Fróðason | M | 17 ár | 10 | 607 |
| John Frederiksen | Á | 21 ár | 10 | 578 |
| Petter Bjørlund | V | 27 ár | 8 | 699 |
| Silas Eyðsteinsson | MV | 19 ár | 8 | 658 |
| Sigtór Petersen | M | 29 ár | 2 | 135 |
| Rói Hansen | Á | 20 ár | 2 | 34 |
| Teitur Olsen | M | 19 ár | 0 | 0 |
| Niels Mouritsen | V | 18 ár | 0 | 0 |

Venjari: Sigtór Petersen

**NSÍ**

| Navn | Pláss | Aldur | Dystir | Min. |
|---|---|---|---|---|
| Klæmint Olsen | Á | 27 ár | 24 | 2069 |
| Per Langgaard | V | 26 ár | 23 | 2027 |
| Pól Jóhannus Justinussen | V-M | 28 ár | 23 | 2013 |
| Karl Løkin | M | 26 ár | 22 | 1867 |
| Jan Ellingsgaard | V-M | 27 ár | 22 | 1263 |
| Petur Knudsen | M | 19 ár | 22 | 1225 |
| Bárður Hansen | V-M | 25 ár | 21 | 1539 |
| Símun Rógvi Hansen | MV | 30 ár | 20 | 1800 |
| Jens Joensen | V | 28 ár | 20 | 1737 |
| Betuel Hansen | M | 20 ár | 20 | 1691 |
| Árni Frederiksberg | M | 25 ár | 19 | 1566 |
| Einar Tróndargjógv | V-M | 29 ár | 19 | 1381 |
| Jann Benjaminsen | M | 20 ár | 18 | 1083 |
| Tobias Olesen | V | 21 ár | 13 | 1161 |
| Jonleif Højgaard | M-Á | 28 ár | 10 | 324 |
| Andri Benjaminsen | M-Á | 18 ár | 10 | 277 |
| Mórits Heini Mortensen | M | 18 ár | 7 | 88 |
| Karstin Hansen | MV | 19 ár | 4 | 360 |
| Jann Martin Mortensen | M | 27 ár | 2 | 115 |
| Bogi Løkin | M | 28 ár | 2 | 64 |
| Pætur Hentze | V | 17 ár | 2 | 28 |
| Haraldur Højgaard | M-Á | 22 ár | 2 | 17 |
| Christian Høgni Jacobsen | Á | 37 ár | 1 | 14 |
| Hans Marius Davidsen | Á | 19 ár | 1 | 7 |
| Eli Joensen | MV | 18 ár | 0 | 0 |
| Petur Sjúrður Lamhauge | MV | 18 ár | 0 | 0 |
| Atli Petersen | V | 16 ár | 0 | 0 |

Venjari: Anders Gerber

**STØÐAN Í EFFODEILDINI**

| Nr. | Lið | D | MM | S |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Víkingur | 24 | 27 | 49 |
| 2 | KÍ | 24 | 20 | 45 |
| 3 | B36 | 24 | 24 | 44 |
| 4 | NSÍ | 24 | 22 | 40 |
| 5 | HB | 24 | 13 | 37 |
| 6 | Skála | 24 | -10 | 29 |
| 7 | TB/FCS/Royn | 24 | -10 | 28 |
| 8 | EB/Streymur | 24 | -15 | 26 |
| 9 | 07 Vestur | 24 | -27 | 22 |
| 10 | ÍF | 24 | -44 | 9 |



unicar.fo

FAIR CAR RENTAL - +298 544 000

BILAR TIL SØLU Á UNICAR.FO

Faroe Travel

- Ferðaseðlar um allan heim

www.travel.fo

Skógvar og klæðir til kvinnur og menn

John Poulsen

FO-385 Vatnsoyrar . Tlf. 332034 . jp@johnpoulsen.fo

CARRO

carro.fo - 21 25 51


TEAM
POLARIS
RZR
4A
www.4a.fo
Bakkavegur 35 • 380 Sørvágur • +298 22 87 41 • 4a@4a.fo


Spf. KJO v. Kristian Olsen
Sørvágur
Tel 210452-210952
Maskin og Lastvognskoyring


WENGER
SAMLA
MERKIR
FYRSTA FLOKS TASKUR
OG KUFFERT
Føroya Keypssamtøka
fk
Tín handil
Til og við
10. JUNI 2017
fært tú eitt samlimerki,
fyri hvørjar 50 kr, ið tú
keypir fyri í tínum
FK handli.
Einans
limir í FK
kunnu gera nýtslu
av merkjunum









**Neinbjørn Nattestad**
Bilverkstaður
**Tlf. 332727 | Fax. 333727**



Sportigan

ÍTRÓTTUR. ALT ÁRIÐ.

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

**WWW.SKALKUR.FO**

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heill 6 metur til longdar.

SANDAVÁGS TIMBURHANDIL
Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo






**#FLÚGVAFYRIFØROYAR**

Atlantic Airways Vagar Airport 380 Sørvágur Tel 34 10 00 www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

BURÐARDYGGUR

HAVBÚNAÐUR



HIDDENFJORD®

Raised in the Wild.



www.hiddenfjord.com • hiddenfjord@hiddenfjord.com • +298 662100